


Lagt til rættis: Eydna Skaale



**Hvussu eitur tú?** Sunva Eysturoy Lassen
**Aldur?** 33 ár
**Hvaðani ert tú?** Úr Havn

**Hvat hevur tú lisið?** Bachelor of Arts (BA): Professional Photography

**Hvar hevur tú lisið?** Á Brooks Institute of Photography í Santa Barbara, California

**Hvussu kanst tú lýsa skúlan/ undirvísingina?** Tað er ein av førandi fotografskúlunum í USA. Undirvísingin er á sera høgum støði, og man arbeiðir allatíðina við tí nýggjastu vitanini og tøknini. Vit høvdu fotografi 2 ferðir um vikuna, tvs 14 tímar av undirvísing tilsamans, og sera nógvar uppgávur í sambandi við fakið. Innan foto var tað nokk 20% undirvísing og 80% uppgávur. Umframt foto høvdu vit "general education", fak, sum samskifti, business, kunstsøgu, o.a., sum er relaterað til høvuðsfakið. Tað er ein sera strævin skúli at koma ígjøgnum, og krøvini eru høg. Um tú ikki avleverar uppgávur til tíðina, so sleppur tú ikki at avlevera, óansæð hvør umberingin er. Ert tú 5 min ov sein í skúla, er sloganið: "don't bother showing up". Tað eru 300 næmingar, so tað er ein lítil, men ekstremt dýrur skúli. Eg fekk 2/3 goldnar av stuðulsstovninum og mátti rinda 1/3 sjálv.

**Hvussu kanst tú lýsa lestrarlívið?** Tað er so kul at búgva har, tí møguleikarnir eru so nógvir. USA hevur alt, sum tú kundi hugsað tær. Tað er ein tími at koyra til LA, 4 tímar til Mexico, 3 tímar til Las Vegas osv. Amerikanarar eru fantastiska gestablíðir og lættir at koma í samband við. Vit funnu eisini eina góða samkomu, sum vit vóru sera glað fyri.

**Fyrimunir við at lesa har tú vart?** Tú verður tikin inn í eina verð, har tú ikki hevur nakað Føroyahús, kristnastovu ella føroyskar grannar at styðja teg til. Vit høvdu bara amerikanskar vinir og gjørdust skjótt integrerað í samfelagið. Mín fatan er, at føroyingar, sum lesa niðri, sera sjáldan fáa danskar vinir, men fylgjast mest við hinum føroyingunum. Tað er tí ein fantastiskur møguleiki at fara longri: tú fært lestrarstuðul, part av skúlanum goldnan, upplivilsi og innlit í eitt samfelag, sum tú annars ikki hevði fingið, um tú bara vart saman við føroyingum alla tíðina.

**Vansar við at lesa har tú vart?** Tað tekur 2 dagar at flúgva heim, so man er øgiliga langt burturi. Men tað er tann einasti vansin. EG ELSKI USA!

**Hvussu eru arbeiðsmøguleikarnir í Føroyum?** Teir eru ikki eins nógvir, sum uttanlands, tú mást sjálv skapa teir, um tú vilt arbeiða desiderað við foto. Ætlanin var alla tíðina at hava mín egnu fyritøku, og eg stovnaði felagið "Mureldur", beint sum vit komu heim aftur. Ótrúliga avbjóðandi og spennandi at fáa tingina at hanga saman bæði kreativt og praktiskt.

*Skriva til Sunvu og spyr um skúlan, útbúgvingina ella lestur í California á: mureldur@gmail.com*



**Hvussu eitur tú?** Linda Dam Jacobsen
**Aldur?** 25 ár
**Hvaðani ert tú?** Tórshavn

**Hvat lesur tú ?** Annað árs læraralesandi á Føroya Læraraskúla

**Hvar hevur tú verið sum skiftisnæmingur?** Í januar vóru Símun Joensen og eg í starvsvenjing á einum skúla í Boca Raton í Florida. Skúlin, ið er ein almennur skúli, kallast Roca Raton Community High School og har ganga beint undir 3000 næmingar. Næmingarnir, ið vit undirvístu, vóru millum 14 og 18 ára gamlir.

**Hvussu kanst tú lýsa skúlan/ undirvísingina?** Ein ímyndar sær ofta, at tað ikki er so gott skil á í teimum almennu skúlunum í USA. Men soleiðis var ikki her. Alt var væl skipað og skúlin hevði nógv góð úrslit at vísa á. Men tað var nógv, ið var rættiliga nógv øðrvísi enn tað, ið vit kenna til her heima í Føroyum. Flokkarnir vóru munandi størri – uml. 35 næmingar, og har vóru nógvar tjóðir umboðaðar. Samskiftið millum lærara og næmingar var ikki so ofta "ping pong" samskifti, men heldur var tað lærarin, ið tosaði, og næmingarnir sloppu til orðanna, tá ið teir skuldu leggja fram/lata uppgávu inn. Virðingin fyri lærarinum var eisini ein heilt onnur, enn tann, vit kenna í Føroyum, har vit nevna læraran við fornavni ella bara "tú". Lærarin varð altíð nevndir við eftirnavn, so tað var rættiliga øðrvísi og nakað, ið vit líku skuldu venja okkum við, tá ið vit vóru kallaði Mr. Joensen og Ms. Jacobsen. Men eg má nú siga, at tað var eitt sindur stuttligt at kenna seg so privileged eina løtu ;)
Vit søktu um ferðastuðul frá Studni. Mann kann í mesta lagi fáa 7000 kr (nú er tað akkurát broytt til 6000 kr), so tað, ið ferðin kostaði útyvir tað, rindaðu vit sjálvi.

**Hvussu kanst tú lýsa lestrarlívið?** Hetta var eitt sera gott upplivilsi. Vit fingu møguleika at síggja, hvussu alt virkaði á skúlanum, men komu eisini í samband við onnur lesandi, ið vóru á okkara aldri. Øll vóru sera áhugað í at hoyra um Føroyar, og tað var als ikki spart uppá blíðskapin mótvegis okkum báðum.

**Fyrimunir við at vera í starvslæru har tú vart?** Ein sær eina heilt øðrvísi skúlaskipan og kann seta hesa í mun til ta føroysku – hetta, fyri at læra okkum, hvat vit kunnu gera betri, men eisini so vit síggja, at tað er nógv í føroysku skúlaskipanini, sum vit gera, ið er framúrskarandi, og vit skulu ikki altíð halda, at grasið er grønari á hinari síðuni. - Og so var tað nú heldur ikki verri, at vit fingu notið eitt sindur av sól, meðan vit vóru í starvslæru ;)

**Vansar við at lesa har tú vart?** Eg dugi tíbetur ikki at síggja nakran vansa við at vera í starvsvenjing í Florida – tað var eitt gott upplivilsi, og vit hava lært nógv.

**Hvussu eru arbeiðsmøguleikarnir í Føroyum, tá lesnaðurin er liðugur?** Sum er nú, eru teir góðir, so vit vóna, at teir eisini eru tað um 2 ár.

**Vilt tú lata meg prenta tínar kontaktupplýsingar, soleiðis at fólk, sum ivast í útbúgvingarmøguleikum, kunnu skriva til tín?** Jeps, eingin trupulleiki :) linda_dj@hotmail.com



**Hvussu eitur tú?** Henry Petersen
**Aldur?** Eg eri 27 ára gamal. Føddur í 1983.
**Hvaðani ert tú?** Eg eri uppaldur á Kambsdali, sum hoyrir til Fuglafjørð, har eg gekk í fólkaskúla og íðkaði ítrótt.

**Hvat lesur tú ?** Eg byrjaði at lesa til Markandarføringsøkonom á Niels Brock í Keypmannahavn. Á triðja semestri valdi eg at taka eitt semester a Malta. Malta-túrurin bleiv longdur vid vid einum semestri afturat, tì eg fann eina fyritøku, sum vildi hava meg at skriva mína høvuðsritgerð fyri tey. Eg hugsadi, at hetta kundi menna mína enskttalandi síðu. Eg haldi, at føroyingar í heila tikið skuldu roynt seg meiri í enskum, fyri at gerast sindur skrappari í handilsenskum. Tað er himmalvíður munur á at lesa og so at royna seg við tí í veruliga lívinum.

**Hvar lesur tú ?** Eg læs á Niels Brock i Keypmannahavn, og hetta gevur tær fleiri møguleikar at royna teg uttanlands, t.d. í Sudurkorea, USA og í mínum føri Malta.

**Hvussu kanst tú lýsa skúlan/ undirvísingina?** Tað er so stórur munur á Niels Brock og universitetinum her á Malta. Niels Brock er meira klassabaserað, einir 30 næmingar í hvørjum flokki. Men á Malta eru tað stórir flokkar, onkuntíð upp í 150 næmingar. Tað er ringt at hava individuellar diskussiónir, teimum fær man meiri burturúr við at kjakast í bólkum. Skal ikki gera meg klókan uppá hvat er betur, men tað eru tvey ymisk ting, har eg heilt víst havi lært nógv av báðum.

**Hvussu kanst tú lýsa lestrarlívið?** Lestrarlívið í síni heild er feitt. Hvat er tad ikki herligt at møta nýggjum fólki, tað gjørdi eg bæði í Keypmannahavn og á Malta. Her á Malta møtti eg fólki, sum vóru í somu støðu sum eg, nýggj og óvitandi um hvat stóð fyri framman. Tey lokalu skal man bara líka náa ígjøgnum til. Fólk plaga at siga, at tad er so strævið at lesa. Eg haldi, at tað er nakað tvætl, tað er at njóta lívið, umringaður av bókum, vitan og forvitnum fólki. Tað er tað besta strævna lívið, eg veit.

**Fyrimunir við at lesa har tú ert?** Ein fyrimunur við universitetinum á Malta er heilt sikkurt tað tvørmentanarliga; tú ert noyddur at samskifta á einum máli, tú ikki ert vanur at samskifta við dagliga. Og her á Malta: veðrið rokkar, tað er ikki so galið at sita úti í garðinum við bólkinum og kjakast um eitt evni, tá hitin liggur um eini 25 stig allatíðina.

**Vansar við at lesa har tú ert?** Vansarnir eru eisini til, tí tey á Malta byrja at lesa ógvuliga tíðliga, so tú kanst koma í flokk saman við yngri fólki. Tey kunnu fara á universitet, tá tey eru 17-18 ára gomul. Tað hendi, at eg var 26 ára gamal, og tey í bólkinum vóru 20-21 ára gomul í miðal. Tá verða sjónarmiðini rættuliga ymisk. Trupulleikin við undirvísingini var onkuntíð, at tá vit kjakaðust í flokkinum, fór tað av og á fram á maltesiskum, sum ikki er lætt at skilja.

**Hvussu eru arbeiðsmøguleikanir í Føroyum, tá lesnaðurin er liðugur?** Eg búgvi á Malta, men tað er ikki tí, at arbeiðsmøguleikarnir eru vánaligir. Meira tí, at eg persónliga ikki síggi Føroyar, sum eitt attraktivt land at búgva í. Samfelagið útviklar seg ikki serliga skjótt.

*Um tú vilt spyrja Henry um útbúgvingina ella at lesa á Malta, skriva so til: hmp@tpost.fo*